# TB fær serbiskan styrk

**Væntandi koma tveir serbar í hesi vikuni til Tvøroyrar, har teir skulu styrkja um liðið hjá aldursforsetanum í føroyskum fótbólti**

FÓTBÓLTSSTYRKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í hesum døgum leggja fótbóltsfeløgini kring landið seinastu hond á fyrireikingarnar til fótbóltsárið, sum fer av bakkastokki í komandi mánað. Nýggja liðið í 1. deild, TB, hevur í hesum sambandi styrkt sær um møguleikarnar fyri at yvirliva í deildini við at fáa fatur á tveimum serbiskum leikarum.



*TB-liðskiparin, Óli Johannesen, fer komandi kappingarár allarhelst at hava serbiska Ace Petrovic undir liðini á sær í miðverjuni hjá TB*
*savnsmynd*

### Málverji og verjuleikari

Teir báðir serbarnir koma til Føroya væntandi í hesi vikuni, og talan er um ein málverja og ein verjuleikara.

Málverjin eitur Predrag Markovic, og hann er 28 ára gamal. Markovic spælir í løtuni við einum liði í triðfremstu deildini í Serbia, men hann hevur eisini spælt í fremstu og næstfremstu serbisku kappingini.

Verjuleikarin, sum fær í næstum, eitur Ace Petrovic. Hann er 29 ára gamal, og eins og nýggi málverjin spælir hann í løtuni við einum liði í serbisku 3. deild, men eisini hann hevur roynt seg í teimum báðum ovaru deildunum í Serbia.

Bjarni Mortensen, formaður í fótbóltsdeildini hjá TB, sigur, at felagið hevur fleiri góðar og ungar spælarar, men at tørvur er á nøkrum royndum kreftum, um liðnum skal verða lív lagað í bestu deildini. Tí hevur TB fingið sær fatur á teimum báðum serbunum, sum teir vóna fara at styrkja liðið munandi.

Tað er eisini ein sannroynd, at nú kappingarárið verður longt, er neyðugt hjá feløgunum at hava ein rímuliga breiðan hóp, og tí kemur tilgongdin av teimum báðum serbunum væl við hjá TB.

### Seks útlendingar

Tá ið teir báðir, Predrag Markovic og Ace Petrovic, eru komnir til Tvøroyrar, eru ikki færri enn seks útlendingar í hópinum hjá TB.

Umframt teir báðar nýggju serbarnar, er talan um Alexander Jovevic, ið er komin úr NSÍ, og so ghanesarnar Larby og Nyarko, og Predrag Zivkovic, ið allir tríggir vóru við í fjør. Bjarni Mortensen greiðir frá, at allir seks hava ikki loyvi til at verða á vøllinum í senn, tí sambært lógini kunnu bert fimm teirra verða á liðnum samstundis. Á Tvøroyri eru teir langt síðani farnir undir venjingarnar undir leiðslu av nýggja venjaranum, Milan Milanovic, og sum skilst eru menn stak væl nøgdir við nýggja venjaran. Í løtuni verður vant einar seks ferðir um vikuna, og millum 15 og 20 mans eru til venjing hvørja ferð.

Formaðurin í fótbóltsdeildini hjá TB, Bjarni Mortensen, sigur, at málið hjá TB fyri komandi kappingarár er fyrst og fremst, at liðið verður verandi í fremstu deildini. Hann leggur afturat, at við tí fólki, sum TB hevur, eru vónirnar um framhaldandi lív í fremstu deildini eisini góðar.

# Landsliðið á La Manga

**Í hesum døgum er ein ung útgáva av føroyska fótbóltslandsliðnum á venjingarlegu í La Manga í Spania**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum vant er føroyska fótbóltslandsliðið á venjingarlegu í Spania í februar mánað. Landsliðshópurin fór av landinum um vikuskiftið, og aftur í ár gongur leiðin til La Manga í Spania.

### Nógv nýggj andlit

Í 20-mans stóra hópinum var ein rúgva av nýggjum andlitum í landsliðshøpi. Nógvir av vanligu stuðulsleikarunum eru ikki við á ferðini, og tí verður venjingarlegan heldur nýtt sum eitt høvi hjá landsliðsvenjaranum, Henrik Larsen, at hyggja nærri at summum av teimum, ið banka upp á landsliðsdyrnar.

Talan er fyrst og fremst um ungar leikarar, ið teir allarflestu hava roynt seg á ymiskum ungdómslandsliðnum hjá FSF.

Í mun til undanfarin ár verður tí heldur ikki lagdur stórur dentur á venjiingardystir á venjingarleguni, tí bert tann eini er á skránni. Hann verður á skránni fríggjadagin, tá ið landsliðshópurin skal royna seg móti norska tippeligaliðnum HamKam, sum hevur navnframa Ståle Solbakken sum venjara.

# Stovna Sumba/VB í kvøld

**Í kvøld verður stovnandi aðalfundur av nýggja fótbóltsfelagnum í sunnaru helvt av Suðuroynni, og so verður av álvara farið undir fyrireikingarnar til kappingarárið**

SAMANLEGGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur ljóðað, at vátt var komið í reiðrið í sambandi við samanleggingina av Sumba og VB, men í kvøld verður stovnandi aðalfundur av nýggja felagnum, og einki hald tykist verða í leysatíðindunum.

### Gomlu nevndirnar hjálpa tí nýggju

Í sambandi við stovnandi aðalfundin av nýggja felagnum verður vald ein 7-mannanevnd at standa fyri leiðsluni av nýggja samanlagda felagnum.



*Símin Samuelsen fer at hava fleiri sumbingar sum liðfelagar í nýggja kappingarárinum á nýggja liðnum Sumba/VB*
*savnsmynd*

Av teimum sjey nevndarlimunum verða fýra úr teimum gomlu nevndunum í ávíkavist VB og Sumba. Tveir úr Sumba og tveir úr VB, meðan tríggir teir seinastu verða nývaldir.

Sagt verður, at hetta verður gjørt fyri at hjálpa nýggju nevndini í uppstartinum av nýggja felagnum, og seinni verður nevndin so minkað nakað.

Stovnandi aðalfundurin av nýggja samanlagda felagnum verður í VB-húsinum í kvøld klokkan átta.

Sjálvt um felagið ikki er formelt sett á stovn enn, so hava teir tó sent minstukrøvini frá UEFA inn til Fótbóltssambandið, tí evstamark fyri at senda hesi inn er í dag.

### Eisini nýtt fólk

Vant hevur verið í eina tíð suðuri í Vági, men tað er ikki fyrr enn nú í seinastuni, at uppmøtingin til venjingina hevur verið nøktandi. Sum skilst var eitt sindur av ónøgd við, at serliga sumbingar vóru heldur seinir at koma í gongd við venjingina, men hetta tykist alt at verða í lagi nú.

Tað er danin, John Christensen, ið venur Sumba/VB, og hann hevur eisini fingið fatur á onkrum nýggjum spælara. Talan er um ein afrikanskan spælara, sum tað tó ikki hevur eydnast okkum at fáa nærri upplýsingar um.

Í sambandi við samanleggingina av Sumba og VB er tó eingin avtala gjørd um, hvussu nógvir spælarar úr Sumba og hvussu nógvir úr Vági skulu verða á liðnum, men tað man verða lítið at ivast í, at tað er kærkomið hjá nýggja venjaranum, at hópurin helst verður væl breiðari, enn hann var í fjør, tá ið tað bara var VB.